


## Tungt hjá Restorffs

Raksturin hjá P/F Restorff's Bryggjarí hevur gingið striltið seinnu árini. Eftir nøkur ár við smærri undirskotum, var hallið í fjør 3.803 tkr. Í ársfrágreiðingini sigur leiðslan, at hetta einamest kemst av minkandi framleiðslu. Bæði tí sølan av øli hevur verið minkandi, eins og felagið í fjør seldi sodavatnsframleiðsluna til P/F Føroya Bjór. Takkað verið eini uppskriving av virkisbygninginum, er eginognin framvegis positiv, men skal tað standa við, er neyðugt at fáa avlop í fyritøkuna. Eitt mál, sum leiðslan ætlar at røkka við at nútímansgera framleiðsluna og við at styrkja um kapitalgrundarlagið undir fyritøkuni.

## Fleiri hava hálvan frídag

Í morgin er minningardagur teirra sjólátnu, og hjá nøkrum feløgum er talan tá um hálvan frídag. Vinnuhúsið upplýsir á netinum, at limir hjá Føroya Arbeiðarafelag og Klaksvíkar Arbeiðsmanna/kvinnufelag verða lønt eftir yvirtíðarsatsum, um arbeitt verður eftir klokkan 12 hendan dagin.

# Bora Williambrunnin um góð

**Oljuleitingin á føroyska landgrunninum liggur nú í hondunum á nøkrum av heimsins størstu oljufeløgum, BP og Shell umframt tí amerikanska felagnum Anadarko. Um góðar 8 mánaðir setir hetta samtakið av tungvektarum og við BP sum fyristøðufelag borin í Williamleiðina, einar 150 kilometrar úr Føroyum. Borað verður djúpri enn 4 kilometrar**



*Hjarnar Djurhuus, føroyski umboðsmaðurin hjá BP saman við Tim Goodwin, sum saman við øðrum fer at standa á odda fyri boringini næsta ár*

*Mynd Jan Müller*

WILLIAMBRUNNURIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Nú fimta oljuboringin á føroyska landgrunninum heldur ikki gav eitt nøktandi úrslit verða øll eygu nú vend móti Williamleiðini nakað syðri á landgrunninum enn Brugdan, sum júst er borað og sum var turr. Tað er BP, sum er fyristøðufelag fyri hesi boring á loyvi 007. Hini feløgini, sum eru við, eru Shell og Anadarko. Verkætlanarliðið hjá BP hittist fyri fyrstu ferð í Aberdeen nú um dagarnar. Við úr Føroyum var Hjarnar Djurhuus, føroyski umboðsmaðurin hjá bretska oljurisanum. Her er talan um tann næsta brunnin, sum BP borar við Føroyar. Fyrstu ferð gekst ikki sum ætlað, tá borað varð í sokallaða "Gullhorninum" í ein landssyning úr Føroyum. Brunnurin hjá BP, Svínoy var eins og hinir tríggir brunnarnir í hesum økinum eitt vónbrot, tó at ein virkin kolvetnisskipan varð staðfest. Tað var í sjálvum sær av stórum týdningi fyri víðari kanningar og leiting á landgrunninum.

### Virkið á Atlantsmóti

BP, sum leingi hevur arbeitt saman við einum øðrum av heimsins størstu oljufeløgum, Shell, er tað oljufelagið, sum í dag er mest virkið á Atlantsmótinum vestan fyri Hetland, tá talan er um framleiðslu av olju og gassi. Felagið legði eisini harðast út, tá fyrsta útbjóðing lat upp her hjá okkum og beyð sær til at bora ikki færri enn tríggjar brunnar. Tað skuldi so vísa seg eftir ta fyrstu boringina, at BP metti ikki, at har var nakað at fara eftir í "Gullhorninum". Tí fór BP undir samráðingar við føroyskar oljumyndugleikar um at flyta síni boriforpliktilsi longur inn á landgrunnin, inn á tað nógv umrødda basaltið. Samráðingar vórðu so eisini við amerikanska oljufelagið Anadarko, sum umsitur loyvið 007 og hevur gjørt rættiliga umfatandi kanningar har. Endin varð, at BP, Shell og Anadarko gjørdu eina avtalu sínamillum og við føroyskar myndugleikar um at leggja teir báðar brunnarnar, sum vóru eftir at bora frá 1. útbjóðing, saman og bora ein brunn á landgrunnsbasaltinum. Eina nøkunlunda eins avtalu gjørdu Statoil og Amerda Hess samtøk sínámillum og við myndugleikarnar, og tað var Brugdan, sum júst er liðug borað.

### Startskot

Hjarnar Djurhuus, sum hevur verið umboðsmaður hjá BP øll hesi árini felagið hevur verið virkið í Føroyum, sigur, at fundurin hann júst er heimafturkomin av í Aberdeen varð eitt slag av startskotið til komandi boringina. Tey umleið 16 fólkini í verkætlanarbólkinum vóru saman í tveir dagar og settu út í kortið stóru og spennandi boriverkætlanina, sum hevur fingið heitið William.

BP hevur gjørt av at bora á landgrunninum í 3. ársfjórðingi í 2007, á 007 loyvinum. Hetta skuldi so merkt í teoriini, at til ber at seta borin í William 1. juli ella um umleið 8 mánaðir. BP ynskir tó ikki at áseta nakran ávísan dag men heldur seg til 3. ársfjórðing. Tað er jú ikki óvanligt, at seinking er í, tá talan er um at fáa pall á borileiðina. Avtala er annars gjørd um at leiga boripallin "Transocean Rather", sum eftir øllum at døma verður ein týðandi aktørur, spælari á Atlantsmótinum bæði í ár og næsta ár. Tað er nevniliga so, at júst hesin pallurin í løtuni borar tríggjar metingar- og avmarkingarbrunnar (appraisal) á Rosebankkelduni skamt frá føroyska markinum. Boritíðin er mett til at vara heilt til várs, tað veldst so sjálvandi um, hvussu gongst. Borurin varð settur í Rosebank í farnu viku, og tað er so nakað seinkað í mun til upprunaligu ætlanina.

### Rosebank og vit

Men hvussu og ikki, so fer ljóskastarin at verða settur á júst henda boripallin komandi árið. Tað verður hann og hansara fólk, sum nú standa til at skulu finna fyrstu føroysku oljuna og samtíðis finna svarið, um Rosebank veruliga er eitt risasstórt oljufund, sum hildið verður. Og verður Rosebank væleydnað, so fer tað alt fyri eitt at fáa lív í tann partin av føroyska landgrunninum, sum liggur upp at Rosebank, føroysku megin markið. Har hava somu feløg, sum hava funnið Rosebank, Chevron, Statoil, Dong og OMV, loyvi at bora, og tað er sera sannlíkt, at tey fara at bora her í 2008 ella 2009, verður Rosebank positivt, sum nógv halda.

Tað er mitt í øllum hesum spennandi útviklinginum, at BP liðið nú setir út í kortið. Komandi tíðina fara fleiri av serfrøðingunum hjá felagnum at flyta inn á skrivstovuna hjá felagnum Yviri við Strond, har tað hevur verið rættiliga friðarligt nú í fleiri ár. Hesi fólkini skulu til at práta við føroyskar myndugleikar, stovnar og fyritøkur av ymsum slag, nú tað eru so mong viðurskifti, sum skulu koma uppá pláss undan eini so stórari boriverkætlan. BP hevur annars longu gjørt av at brúka útgerðarhavnina í Runavík.

### Meira enn 4000 metrar

Vit spurdu Hjarnar Djurhuus, hvussu er við dýpi og longd av boring. Hann

## Rimmar tøl frá Statoil

Úrslitið hjá Statoil í juli-ársfjórðingi var betur, enn marknaðarserfrøðingar høvdu væntað. Við einum meðal oljuprísi beint niðan fyri 70 dollarar fyri tunnuna var úrslitið fyri skatt 27,8 mia. norskar krónur ímóti 24,4 mia. krónum í sama ársfjórðingi í fjør.

Inntøkurnar vóru 106,3 mia. krónur ella slakar fýra mia. krónur meiri enn í triðja ársfjórðingi í 2005.

Í meðal fekk Statoil 69,2 dollarar fyri tunnuna í juli-ársfjórðingi, og tað var 13 prosent meiri, enn felagið fekk í triðja ársfjórðingi í 2005. Gassið gav uppaftur meiri, tí gassprísurin var heili 33 prosent hægri enn í fjør. At úrslitið ikki gjørdist betur, enn tað bleiv, kemst av, at framleiðslan var minni í ár enn í fjør.

Norskir fjølmiðlar skriva, at Kristin Halvorsen, fíggjarmálaráðharri, kann ikki annað enn frøast um úrslitið hjá Statoil. Eitt er, at staturin eigur 70 prosent av felagnum, men av avlopinum í triðja ársfjórðingi skal felagið rinda 19,1 mia. krónur í skatti. Sostatt hevur felagið 8,6 mia. krónur eftir at leggja í kassan, tá skatturin er goldin, og tað er eitt prosent minni enn í sama ársfjórðingi í fjør.

# ar átta mánaðir

sigur, at dýpið, har BP fer at bora, er einar 740 metrar. Ætlanin er at bora meira enn 4000 metrar frá sjóvarmálanum. Sjálv boritíðin er mett til einar 80 dagar, tvs. nakað stytri enn boritíðin hjá Stena Don á Brugduleiðini. BP ynskir ikki at gera viðmerkingar til, hvussu tjúkt basaltlagið er her. Men líkt kundi verið til, at basaltið er nakað tynri enn á Brugduleiðini, tá hugsað verður um, at William liggur nakað longri úr Føroyum enn Brugdan, og vit vita, at basaltið verður tynri sohvørt vit koma longri úr Føroyum.

Ein av oddamonnunum hjá BP fyri hesi boringini, Tim Goodwin segði við Vinnusíðurnar herfyri, at teir ætla sær at vera eitt sindur varnir hesaferð ikki at hava ov stórar vónir, tí talan er um ókent og sera váðiligt øki, har tað ikki er borað áður. Hann metti, at sannlíkið fyri at gera eitt fund er 1 út av 10. Kortini helt hann møguleikarnar vera góðar fyri at fáa eina skilagóða boring og metti somuleiðis, at úrslitið av Brugduni fór ikki at fáa nakra avleiðing fyri William. Sosialurin skilur, at sjálvt prospektið William skal vera eitt sindur øðrvísi enn Brugdan, og møguliga eisini betri. Hvat tað so vil siga kann bert tíðin vísa.

Nú Brugdan ikki gjørdist so áhugaverd sum vónað spurdu vit føroyska BP stjóran, um tað er sannlíkt, at teir fara at lata dyrnar uppá glopp fyri at fáa onnur feløg við í boringina, fyri harvið at spjaða váðan uppaftur meira. Hann sigur, at tað vil altíð vera áhugi fyri slíkum brunnum, men nú fáa vit so at síggja, hvat hendir. Spurningurin er so eisini, hvør ávirkan verður av Brugduni.




*Williambrunnurin liggur miðskeiðis millum Føroyar og Hetland, tó væl nærri Føroyum.*



*Vit koma at hoyra nógv til henda boripallin komandi árið. Transocean Rather hevur júst sett borin í Rosebankleiðina skamt frá markinum, og tá hann er liðugur har í vár gongur leiðin inn á føroyska landgrunnin at bora Williambrunnin.*




*Hjarnar Djurhuus greiðir verkætlanarbólkinum, sum stendur fyri Williamboringini frá um Føroyar í Aberdeen í farnu viku*

*Mynd BP*